Gmail

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya <blf@blf.fo>

# Re: TIL UMMÆLIS. Uppskot til kunngerð um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn. Freist 15. september

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya** <blf@blf.fo> 14. september 2021 kl. 22.36
Til: Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>

Góða Nella,

BLF takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskot til kunngerð um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn.

Í kunngerðini er áseting um setan av løgfrøðingum á Føroya Kærustovni, ið er soljóðandi:

*"§ 50. Løgfrøðingarnir á Føroya Kærustovni skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv ella eina aðra samsvarandi útbúgving.*
*Stk. 2. Tað er ein treyt fyri at vera settur í starv sum løgfrøðingur á Føroya Kærustovni, at viðkomandi hevur ein bachelor í løgfrøði, umframt ein master í løgfrøði. Stk. 3. Aðrar samsvarandi útbúgvingar skulu vera sambæriligar við donsku løgfrøðiligu embætisútbúgvingina."*

BLF mælir til at ásetingin verður orðað greiðari, ella at stk. 2 og 3 verða strikaðar, tí mett verður at tær kunnu rúmast í stk. 1. Um vit ikki fara skeiv, er eingin løgfrøðingur í starvi á Føroya Kærustovni í dag, sum lýkur treytirnar fyri setan sbrt. § 50, stk. 2, har tað er ásett, at tað er ein treyt fyri at vera settur í starv á Føroya Kærustovni, at viðkomandi hevur *master* í løgfrøði.

*Vinarliga, vegna BLF,*

*Elisabeth F. Rasmussen, formaður*

Den ons. 11. aug. 2021 kl. 12.47 skrev Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>:

> Hjáheft verður sent tykkum til ummælis *Uppskot til kunngerð um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn.*
>
> Sjálvt lógaruppskotið um Føroya Kærustovn er aftan á ummælini broytt eitt sindur; mest nágreiningar og ikki avgerandi innihaldsligar broytingar. Til tykkara kunning er lógarteksturin, sum hann nú er, eisini hjáheftur.
>
> Eftir ætlan verður lógaruppskotið um Føroya Kærustovn lagt fyri Løgtingið í næstum. Sum fylgiskjal til lógaruppskotið verður *uppskotið til kunngerð um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn* lagt við, soleiðis at virksemið á Kærustovninum aftan á umskipanina er betri lýst.
>
> **Freistin at senda ummæli er mikudagin 15. september.**
>
> Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo
>
> **Uppskotið er sent beinleiðis til:**
>
> - Almannamálaráðið
> - Heilsumálaráðið
> - Uttanríkis- og mentamálaráðið
> - Umhvørvis- og vinnumálaráðið
> - Fíggjarmálaráðið
> - Fiskivinnumálið

- Føroya Kærustovn
- TAKS
- Akstovan
- Landsverk
- Umhvørvisstovan
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið
- Heilsufrøðiliga starvsstovan
- Vinnustovnurin
- ALS
- Studni
- Almannaverkið
- Familjufyrisitingin
- Landssjúkrahúsið
- Heilsutrygd
- Barnaverndarstovan
- Dátueftirlitið
- Fróðskaparsetur Føroya
- Føroya Kommunufelag
- Advokatfelag Føroya
- BLF
- MEGD
- Vinnuhúsið
- Felagið Miðlafólk

Uppskotið verður eisini lagt alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Vinarliga

Nella Festirstein

Deildarstjóri

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan

Beinleiðis tlf: +298 55 80 76